Útbygging skal styrkja Pure Water

Pure Water byggir út, so arbeiðið hjá virkinum kann verða smidligari, og framleiðslan kann økjast í framtíðini

Tað eru fleiri orsøkir til, at Pure Water í Klaksvík byggir út. Virkið skal hava eina smidligari og skjótari framleiðslu, og virkið ætlar at virka størri nøgd av fiski framyvir

FISKIVINNA

Eyðun Klakstein

Klaksvík: Pure Water í Klaksvík er í holt við eina útbygging av virkinum, sum skal tryggja virkinum størri møguleikar at arbeiða ymisk fiskasløg, samstundis sum øll krøv til matvøruframleiðsluna verða uppfylt. Eisini er ætlanin at økja um munandi virksemið á virkinum í framtíðini.

Pure Water er gamla Roykivirkið í Klaksvík. Nú eru tað JFK, Grønanes og onnur sum eiga virkið, og stjóri á virkinum eru Eyðbjørn Poulsen.

Útbyggingin av virkinum fer fram suðureftir móti stóra bygninginum hjá Northern Fish Cold Storage, og tá arbeiðið er liðugt seint í hesum árinum, hevur Pure Water 600 fermetrar afturat at ráða yvir.

– Tað eru fleiri orsøkir til, at vit byggja út. Vit vilja gjarna hava ein smidligari framleiðslu, so vit kunnu arbeiða ymisk fiskasløg á tveimum linjum. Tað ger, av vit skjótari kunnu skifta millum framleiðslurnar, sigur Eyðbjørn Poulsen.

Betri arbeiðsgongd

Pure Water hevur higartil mest arbeitt laks, men útbyggingin fer at gera tað gjørligt at arbeiða meira av toski, upsa og hýsu, samstundis sum laksaframleiðslan er í gongd.

– Vit vilja lúka øll krøv, sum eru til framleiðslu av matvørum, og útbyggingin skal eisini tryggja hetta í framtíðini. Harafturat fáa vit eina betri arbeiðsgongd eftir útbyggingina. Tað ræður um at arbeiða fiskin skjótt og væl, og har hava vit longu gjørt framstig, sigur stjórin á Pure Water.

– Vit fara eisini at automatisera onkrar partar av framleiðsluni meira. Serliga seinasti parturin av framleiðsluni við pakking og frysting verður í framtíðini meira automatiseraður.

Í løtuni arbeiða millum 30 og 40 fólk á Pure Water, men tá útbyggingin er liðug verður brúk fyri meira fólki á virkinum.

Neyðugt við samstarvi

Virkið, sum liggur á vestara kaiøkið í Klaksvík, roknar við at virka um 2500 tons av fiski í hesum árinum, men framyvir er ætlanin at økja um framleiðsluna. Virkið vónar, at tað í framtíðini kann taka ímóti millum 4 og 5000 tons av fiski.

Pure Water hevur tætt samstarv við JFK og Kósavirkið, og tað heldur stjórin er neyðugt.

– Stóru kundarnir uttanlands vilja hava pakkaloysnir. Tú skalt kunna bjóða teimum eitt breitt úrval av vørum, og tú skalt kunna lata vøruna, tá teir hava brúk fyri tí. Tí er tað umráðandi við samstarvi innan fiskivinnuna, so tú kanst hava eitt gott úrval, og tú hevur rávøruna til virkið, sigur Eyðbjørn Poulsen.

Hann heldur eisini, at tað er ein fyrimunur fyri føroysku virkini, at tey samstarva, tí tað fæst ofta meira burturúr mótvegis útlendskum kundum.

Pure Water útflytir lidnar vørur til nógv lond í Europa. Týskland, Frakland, Ongland og fleiri norðurlond fáa vørur frá Pure Water, meðan so at siga eingin útflutningur er til USA.

Drupu springarar í Gøtu

Gøta: Mánadagin var ein flokkur av springarum funnin uttan fyri Hagaleiti í Leirvíksfirði.

Springararnir vóru riknir til Syðrugøtu, og teir vórðu hildnir til á sandinum har.

Eini 25 bátar og 100 fólk vóru við í rakstrinum og drápinum, og springararnir verða býttir millum hesar.

ek

FAROE Law

heimligar og altjóða loysnir

FAROE Law er føroysk advokatskrivstova, sum veitir løgfrøðiliga vinnuráðgeving og tænastur. Vit bjóða bæði heimligar og altjóða loysnir til
- føroyskar vinnufyritøkur, almennar fyritøkur, stovnar og kommunur
- útlendskar fyritøkur, sum hava virksemi í Føroyum ella hava vinnuligt samstarv við føroyingar
- føroyskar fyritøkur, sum hava ella ynskja at fáa í lag vinnuligt virksemi uttan fyri Føroyar.

FAROE Law veitir millum annað ráðgeving um
- altjóða sáttmálar
- byggiløgfrøði
- fígging
- keyp og sølu av vinnufyritøkum
- oljuløgfrøði
- skattaviðurskifti
- virðisbrævamarknað og prospektir

FAROE Law er deild hjá Dania Advokater A/S, sum hevur høvuðssæti í Danmark. Dania hevur advokatskrivstovur í Keypmannahavn, Svendborg, Nuuk og Moskva, sum veita ráðgeving innan øll øki, eitt nú altjóða vinnuvirksemi. Fyritøkan telur 90 starvsfólk.

FAROE Law samstarvar við stóru ensku og altjóða advokatfyritøkuna CMS Cameron McKenna, ið hevur deildir um allan heim. Hetta er ein stórur fyrimunur, tá føroyingar fara undir vinnuligt virksemi uttan fyri Føroyar.

FAROE Law fekk fasta manning 1. juli í ár, tá Eyðfinnur Jacobsen advokatur tók við starvinum sum leiðari av skrivstovuni. Hann er serkønur í skattligum viðurskiftum.

FAROE LAW

Tinghúsvegur 14, 4. hædd
Postboks 1218 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 99 00 · Fax 35 99 01
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.dk